# Søkt verður eftir Skipsverkfrøðingi til P/F Tórshavnar Skipasmiðju

**Starvið:**
Sum skipsverkfrøðingur kemur tú at arbeiða á teknisku deildini í Havn, har tað, umframt deildarleiðaran, í løtuni starvast 3 verkfrøðingar og 3 tekniskir assistentar.

Starvið fevnur í høvuðsheitum um:
- Stabilitetsútrokningar
- Projektering og dimensionering
- Samskifti við avvarðandi myndugleikar so sum klassa og skipasýnið
- Umframt tilboðsgeving.

**Førleikar:**
Vit rokna við at tú:
- ert útbúgving skipsverkfrøðingur
- hevur góð samskiftis- og samstarvsevnir
- hevur evnir at greina tekniskar trupulleikar, viðgera møguleikar til loysnir og ert før/ur fyri at taka avgerðir.
- Dugir væl at málbera teg á føroyskum og skandinaviskum máli, bæði skrivliga og munnliga. Somuleiðis er tað ein fyrimunur at tú ert væl fyri í enskum máli.

**Vit bjóða:**
Eitt sjálvstøðugt arbeiði við góðum møguleikum fyri persónligari menning. Løn, trygging og eftirløn eftir nærri avtalu partanna millum.

Um hetta hevur tín áhuga ella um tú hevur spurningar hesum viðvíkjandi, vinarliga set teg í samband við Thormund Johannesen ella Gunnar Mohr á tlf. 311155.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving skal sendast til:

Tórshavnar Skipasmiðju
att.: Gunnar Mohr
Box 65
110 Tórshavn

Starvið ynskist sett skjótast gjørligt og umsóknirnar, ið verða viðgjørdar í trúnaði, skulu latast inn áðrenn 15. september 2001.

TÓRSHAVNAR SKIPASMIÐJA
www.faroeyard.fo

Tórshavnar Skipasmiðja er móðirfelag hjá samtakinum ið umfatar skipasmiðjurnar í Havn, á Skála, í Vestmanna og mekaniskan verkstað í Runavík. Á skipasmiðjuni í Havn arbeiða um 170 fólk.

# Søkt verður eftir Maskinverkfrøðingi til P/F Tórshavnar Skipasmiðju

**Starvið:**
Sum maskinverkfrøðingur kemur tú at arbeiða á teknisku deildini í Havn, har tað, umframt deildarleiðaran, í løtuni starvast 3 verkfrøðingar og 3 tekniskir assistentar.

Starvið fevnur í høvuðsheitum um:
- Projektering av maskinrúmum
- Dimensionering av rørskipanum og maskinkomponentum
- Samskifti við klassafeløg og myndugleikar
- Umframt tilboðsgeving.

**Førleikar:**
Vit rokna við at tú:
- ert útbúgving maskinverkfrøðingur
- hevur góð samskiftis- og samstarvsevnir
- hevur evnir at greina tekniskar trupulleikar, viðgera møguleikar til loysnir og ert før/ur fyri at taka avgerðir.
- Dugir væl at málbera teg á føroyskum og skandinaviskum máli, bæði skrivliga og munnliga. Somuleiðis er tað ein fyrimunur at tú ert væl fyri í enskum máli.

**Vit bjóða:**
Eitt sjálvstøðugt arbeiði við góðum møguleikum fyri persónligari menning. Løn, trygging og eftirløn eftir nærri avtalu partanna millum.

Um hetta hevur tín áhuga ella um tú hevur spurningar hesum viðvíkjandi, vinarliga set teg í samband við Thormund Johannesen ella Gunnar Mohr á tlf. 311155.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving skal sendast til:

Tórshavnar Skipasmiðju
att.: Gunnar Mohr
Box 65
110 Tórshavn

Starvið ynskist sett skjótast gjørligt og umsóknirnar, ið verða viðgjørdar í trúnaði, skulu latast inn áðrenn 15. september 2001.

TÓRSHAVNAR SKIPASMIÐJA
www.faroeyard.fo

Tórshavnar Skipasmiðja er móðirfelag hjá samtakinum ið umfatar skipasmiðjurnar í Havn, á Skála, í Vestmanna og mekaniskan verkstað í Runavík. Á skipasmiðjuni í Havn arbeiða um 170 fólk.




**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2413, P/F Handilskjarnin, 100 Tórshavn.

Viðtikið 14.08.2001 at lækka partapeningin við kr. 3.100.000,00 til kurs 100 við útgjalding til partaeigarar, eftir at proklama er runnin.

Skráseting Føroya tann 27. august 2001

Kristin Balle

# Fáa tit ikki blaðið leygardagar?

Vinarliga ring tel. 214118, um tú sum haldari ikki fært leygardagssosialin. Boðar tú ikki frá innan kl. 15.00 leygardag, hava vit ikki møguleika fyri at bera leygardagsblaðið út.

Tíðindablaðið Sosialurin

www.sosialurin.fo

## Kiropraktor
Ári Rasmussen



Viðtala fæst:
Argjum 320212
Runavík 448102



## Skeið í
# Leiðslu og Dialog

Føroyskir Sálarfrøðingar hava gjørt avtalu við vælkendu donsku sálarfrøðingarnar, Benedicte Madsen og Søren Willert, at halda skeið í Føroyum. Dagliga eru Benedicte og Søren leiðarar á »Psykologisk Instituts Center for System-udvikling« við lærda háskúlan í Århus, har tey fáast við at útbúgva sálarfrøðingar, ið taka á seg konsulentuppgávur á arbeiðsplássum.

***Føroyskir Sálarfrøðingar bjóða í hesum viðfangi skeið á høgum støði fyri leiðarar og millumleiðarar tann 26. og 27. september á Hotel Hafnia - báðar dagar frá klokkan 8.30-15.30.***

Arbeitt verður við hesum høvuðsevnum:

- Samskifti og dialog í organisatiónini
- Loyndarmál í organisatiónini
- Leiðslufunktiónir og skipan av toymum (teams)
- Dialogisk handfaring av konfliktum

Skeiðið er skipað við ávikavíst teoretiskum útspæli og virknari luttøku.

Luttakaratalið er avmarkað til 20 luttakarar.

Kostnaður fyri báðar dagarnar er kr. 3000,- (alt. inkl.). Prógv fyri luttøku á skeiðnum verður givið. Tilmelding **í seinasta lagi 13. september** til

***Jan Willemoes*** - 211509 (15.00-16.00) ella
***Jegvan Bæk*** - 218286 (19.00-21.00)

Skrá og tilfar verða send eftir tilmeldingina

Føroyskir Sálarfrøðingar

# Fimleikavenjarar

Havnar Fimleikafelag leitar eftir fimleikavenjarum til komandi vetur. Serliga til

Gentur 4.-5. flokk – amboð
Gentur 8. flokk og eldri – amboð.

Hevur tú áhuga at royna teg, verður tú biðin at seta teg í samband við Karinu á tlf. 319327. Til ber eisini at senda bræv til

**Havnar Fimleikafelag**
box 3145, 110 Tórshavn

# Vindeygu til sølu

9 plastvindeygu frá Alu-plast til sølu - ymiskar støddir.

Áhuga kunnu ringa á **tlf. 221881**

# Kollafjarðar skúli

Søkt verður eftir lærara til tíðaravmarkað starv við Kollafjarðar skúla at undirvísa fulla tíð frá 01.09.2001-31.12.2001 fyri lærara í farloyvi.

Starvið verður lønt samb. sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum frá 18.1 til 27.4.

Umsóknir við avriti av prógvum skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 31.08.2001.

**Kollafjarðar skúlastýri**
v/ Dortheu Joensen
FO-416 Signabøur

## Leiga av ítróttarhøllini í Runavík

Tey, ið ætla at leiga ítróttarhøllina í Runavík veturin 2001/2002, skulu senda skrivliga umsókn til býráðsskrivstovuna í seinasta lagi 3/9-2001.

**Runavíkar býráð**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Rætting til útbjóðing

Í sambandi við útbjóðing av tveimum nýggjum dagstovnum til Tórshavnar kommunu, verður sagt frá, at freistin at lata tilboðini inn er broytt frá 1. september til **3. september 2001, kl. 15.00.**

Av tí at talan ikki er um eina vanliga lisitatión, verða tilboðini ikki lisin upp, tá tey verða latin inn.

Tórshavnar kommuna
Byggi- og býarskipanardeildin

SNARSKIVAN

*P/F Varðin í Gøtu er ein fyritøka í støðugari menning Fyritøkan eigur og rekur trý pelagisk fiskifør og hevur umleið 50 fólk í starvi. Í umsitingini starvast fast 2 fólk - stjórin og eitt skrivstovufólk, men felagið arbeiðir í løtuni við at menna skrivstovuna og søkir í tí sambandi eftir*

# Umsitingarleiðara/skrivara

Starvið er sera fjølbroytt, og arbeiðsuppgávurnar, sum viðkomandi kemur at røkja, eru í høvuðsheitum hesar:

**Uppgávur:**
- At verða við til saman við stjóranum og øðrum starvsfólki at uppbyggja eina vælvirkandi skrivstovu.
- At gera kvartals- og ársroknskap, gera fíggjarætlanir og útrokningar/framrokningar av ymsum slag og annars virka sum fíggjarligur ráðgevi hjá stjóra og nevnd í sambandi við framtíðar ætlanir.
- At leggja til rættis tilfar til fundir og virka sum skrivari á fundum við myndugleikar, fíggingarstovnar og onnur.
- At samskifta við teir marknaðir, sum selt verður til.
- At leggja til rættis dagligu uppgávurnar á skrivstovuni.
- At hava samskifti við peningastovnar um hendi.
- At hava samskifti við skipini um hendi.

**Førleikakrøv:**
Vit vænta, at tú hevur royndir við skrivstovuarbeiði og ert sterkur á tí roknskaparliga/fíggjarliga økinum. Samstundis er tað eitt krav, at tú dugir at nýta tey mest vanligu telduforritini og annars hevur lætt við at seta teg inn í nýggj viðurskifti. Málsliga skalt tú duga væl at orða teg á føroyskum og enskum bæði í skrift og talu.

Sum persónur vænta vit, at tú ert ágrýtin og miðvísur, tær dámar væl stórar avbjóðingar og tú hevur lætt við at samstarva. Harafturat vænta vit, at tú er fleksibul og kanst arbeiða uttanfyri vanliga arbeiðstíð, tá tað krevst. Av tí at størsti parturin av dagliga samskiftinum er um skip og fiskivinnu, kunna umsøkjarar við kunnleika til hesa vinnu hava ávísan fyrimun.

Løn og setanartreytir annars verða sambært avtalu arbeiðsgevara.

Umsóknir verða sendar skjótast gjørligt og í seinasta lagi hósdagin 20. september 2001 til: Virkisráðgeving Spf., Boks 26, 600 Saltangará. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Sigvør Laksá ella Símun Hammer á Virkisráðgeving, tlf. 449591. Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Virkisráðgeving Spf
Leiðsla - Búskapur - Marknaðarføring - Rekruttering - Góðsku-/Umhvørvisskipanir
Heimasíða: http://www.konsult.fo